Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Umstøðurnar hjá ferðafólki í Kalsoynni

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir eru um at betra umstøðurnar hjá ferðafólki á ferjuleguni í Syðradali, so hesi hava eitt skýli ella líknandi at bíða í?
2. Um ongar ítøkiligar ætlanir eru, ætlar landsstýrismaðurin sær so at arbeiða fyri, at eitt skýli ella annað kemur, so ferðafólk kunnu fara inn at kroka?

Viðmerkingar:
Rættiliga nógv ferðafólk fara um Kalsoyarfjørð og harvið ferjuleguna á Syðradali. Í 2019 var talið nærum hálvfjerðstúsund. Men eru ferðafólk ikki í bili hava tey onga staðni at kroka í regni, kava og illveðri annað enn at fara inn í okkurt privat neyst. Fyri at fáa greiðu á hvørjar ætlanir eru um at bøta um hesi viðurskifti, verður hesin fyrispurningur settur

Á Løgtingi, 17. juni 2021

Beinta Løwe Jacobsen